# Til Sølu

## MITSUBISHI PAJER 3,0 V6



**Bert koyrt km 45.000 · Árg. 10/98 ·**
**Bilurin er í sera góðum standi og væl røktur**
**Aircond. og nógva aðra útgerð**

*Fígging kann útvegast*

*Nógv onnur góð tilboð*

**Bilfríðkan á Hjalla**

Tel 35 73 00 ella 21 73 00

sí meira á www.bilfridkan.fo · landsins lagaligasta brúktbilafígging

Sosialurin 341800

# Til Sølu

## PEUGEOT 306



**Bert koyrt km 67.000 · Árg. 4/97**
**Bilurin er í sera góðum standi og væl røktur**

*T.d. útgjald bert kr. 15.000,-*

*Fígging kann útvegast*

*Nógv onnur góð tilboð*

**Bilfríðkan á Hjalla**

Tel 35 73 00 ella 21 73 00

sí meira á www.bilfridkan.fo · landsins lagaligasta brúktbilafígging

Sosialurin 341800

# »Choppari« til sølu



Ein av Føroya vakrastu motorsúkklum til sølu. Er upprunaliga ein Suzuki Intruder VS1400, men er sera nógv umbygd. Súkklan koyrir væl og er í sera góðum standi.

**Tlf. 229404**

**Sosialurin**
www.sosialurin.fo

# Lívbjargari

## til Klaksvíkar Svimjihøll

Í sambandi við at ein av okkara lívbjargarum fer frá vegna aldur, verður søkt eftir mannligum lívbjargara til svimjihøllina í Klaksvík.

Umframt at arbeiða sum lívbjargari, fevnir starvið um at taka eina hond í ymiskt í tí dagliga.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarin skal vera góður svimjari og hava lívbjargararoyndina. Skipað kann eisini verða fyri lívbjargararoynd í sambandi við setan.

**Setanarviðurskifti:**
Talan er um eitt fulltíðarstarv, sum er skipað í vaktir.
Ætlanin er at seta starvið í seinasta lagi 1. oktober. 2004.
Løn sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Kára Kjelnæs svimjihallarleiðara, telefon 21 97 12.

**Umsókn**
viðmerkt »lívbjargari« saman við heilsuváttan, møguligum viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir, skal vera Klaksvíkar kommunu, Postboks 2, 700 Klaksvík, í hendi í seinasta lagi 23. august 2004.

**Klaksvíkar Býráð**




Sosialurin 341800

# Trøð í Øravíkarlíð

umleið 8.000 m², til sølu um hóskandi boð verður givið.

**Tlf. 371442**, best eftir kl. 18.00

# Íbúð til leigu

Góð íbúð við góðum útsýni yvir Nólsoyarfjørð og egnum parkeringsbási, til leigu til fólk, sum ikki roykja ella drekka.

**Tlf. 217300**

**FAROE LAW**

bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við:
Eyðfinn Jacobsen, advokat ella
Kára á Rógvi, adv.fulltrúa um tygara tørv

Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 - fax 359901
mobil 219902 - 222857
faroe-law@faroe-law.fo
http://www.faroe-law.fo

**Sálarfrøðistovan**
Hoyviksvegur 65
Postboks 3134 · 110 Tórshavn

Bílegging av viðtalu
kl. 8.00 - 9.30
gerandisdagar
á tel 310335

**Kári Leivsson**
Autoriseraður sálarfrøðingur
- umfataður av sjúkrakassasáttmála

i Sosialurin

Lesið Sosialin




# Lesið Sosialin

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 1648, P/F Eystaravág, 100 Tórshavn
Viðtøkur broyttar: 30.06.2004
Strikan av hjánøvnum: P/F Skála Skipasmiðja (P/F Eystaravág), P/F Skala Yard Ltd. (P/F Eystaravág) og P/F Skipasmiðjan á Skála (P/F Eystaravág).

Skráseting Føroya tann 26. juli 2004

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 53, P/F Runavíkar Mekaniski Verkstaður, 600 Saltangará

Viðtøkur broyttar: 30.06.2004
Nýtt navn: P/F Matr. Nr. 243 Runavík.

Skráseting Føroya tann 26. juli 2004

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 53, P/F Runavíkar Mekaniski Verkstaður, 600 Saltangará

Viðtøkur broyttar: 30.06.2004
Nýtt navn: P/F Matr. Nr. 243 Runavík.

Skráseting Føroya tann 26. juli 2004

Kristin Balle



# Lærlingur/ skrivstovufólk

Søkt verður eftir lærlingi/skrivstovufólki til bókhaldið hjá Atlantic Airways á flogvøllinum.

Arbeiðið umfatar alt vanligt bókhaldsarbeiði.

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur FHS-, HH- ella líknandi prógv. Vit rokna við, at umsøkjarin er ágrytin og kann arbeiða sjálvstøðugt, dugir at arbeiða við teldu, hevur góðan røkjuskap, dugir at samstarva og hevur yvirlit.

Skrivlig umsókn og prógv verða at senda til Atlantic Airways, 380 Sørvági, í seinasta lagi 15. august 2004.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Atlantic Airways á tlf 34 10 32, 21 37 03 ella 34 10 33.

**ATLANTIC AIRWAYS**
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo

*"Kjálkar, lippur, ræstur fiskur, upsastykkir við barbeque-smakki ....fyrsta floks delikatessur!"*

***- fisk til døgurða minst eina ferð um vikuna!***

# www.fiskakeyp.fo



Á heimasíðu okkara finnur tú eitt stórt úrval av fiski og fiskaúrdráttum til matna. Og har finnur tú eisini døgurðauppskriftina!

Bíleggingarlisti liggur á heimasíðuni. Fyll út og send/faxa til okkara, so hevur tú vøruna við dyrnar 2-3 verkadagar aftaná. Tú kanst eisini ringja ordran inn á tlf. 21 53 35. Skjótt og ómakaleyst.



**Sonni FISKAKEYP**
690 Oyndarfjørdur
Tlf. 21 53 35
Fax 44 52 45

***- tín fiskaveitari á alnótini***

*Gravarhjálp*
Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn
*Tel 311723 - 511723 · Fax 321722*
*www.gravarhjalp.net*

Sosialurin 341800

Lesið Sosialin

**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Meginskrivstovan*

# Leiðari til Serstovnadeildina

Starvið sum leiðari fyri Serstovnadeildina, verður hervið lýst leyst til setan 1. oktober 2004.

Serstovnadeildin er skipað undir Heimarøktini og Serforsorgini og fevnir um bústovnar, sambýlir, verkstaðs- og virknistilboð v.m. innan serstovnaøkið. Serstovnadeildin hevur sítt virksemi kring alt landið.

Leiðarin hevur ábyrgd mótvegis stjóranum.

Leiðarin hevur ábyrgdina av dagligu fyrisitingarligu-, fíggjarligu- og fakligu heildarleiðsluni av deildini og skal standa fyri m.a. hesum høvuðsuppgávum:

- samskipa og menna virksemið á Serstovnadeildini
- røkja ta fyrisitingarligu leiðsluna
- hava eftirlit við og virka fyri, at játtaða fíggjarætlanin verður hildin
- fyriskipa fíggjarlógararbeiðið fyri virksemið hjá Serstovnadeildini í samstarvi við leiðsluna
- reka mennandi starvsfólkapolitikk, herundir fakliga ráðgeving
- seta í starv og siga starvsfólkum úr starvi eftir nærri ásettum reglum
- virka fyri støðugari fakligari menning
- virka fyri góðum samstarvi innanhýsis og við aðrar stovnar og skipanir
- menna samstarv við aðrar fakbólkar, myndugleikar og áhugabólkar

Harumframt skal leiðarin vera við til at koma við hugskotum, fyrireika og fyriskipa víðari menning og útbygging av virkseminum á økinum.

**Førleikakrøv:**
Væntað verður, at umsøkjarin:
- hevur viðkomandi útbúgving og starvsroyndir.
- hevur hollar leiðslu og fyrisitingarligar starvsroyndir
- hevur góð samskiftisevni, herundir góðan málsligan førleika
- evnar at yvirskoða fløktar samanhangir og at taka avgerðir
- er førur fyri at arbeiða undir skiftandi umstøðum
- evnar at seta í verk nýggjar fyriskipanir og verkætlanir og at fylgja hesum upp
- dugir væl við fólki
- er framsøkin, áhugaður og hugkveikjandi

**Setanar- og lønarviðurskifti:**
Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Heimarøktina og Serforsorgina. Tænastustaðurin í løtuni er Serstovnadeildin.

Starvið hevur verið tænastumannastarv. Lønin er flokkað á stigi 49 sambært lønartalvuni hjá Føroya Pedagogfelag.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at hetta kann verða umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 304020 og tosa við Mary J. í Garði, stjóra ella Bjarna Clementsen, leiðara fyri Serstovnadeildina.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Heimarøktina og Serforsorgina**
Att: Mary J. í Garði, stjóri
Eirargarður 2, 2. hædd
Postsmoga 3037
110 Tórshavn

**Umsóknarfreist: Týsdagin 17. august 2004**

Sosialurin Sosialurin i